

*Durita Djurhuus er ein av yngstu kirkjuráðslimunum í landinum. Henni dámar væl at vera við til aðalfundin í felagnum fyri Kirkjuráðslimir, sum í ár varð hildin í Nesvík. – Ein fær altíð okkurt burturúr, sigur hon*

# Bygdu kirkjuna eftir einum ári

3. jóladag, dagin eftir jólaveitsluna, í 1925 kallaði Andrias Weihe fólkið saman til fundar í skúlanum og segði fram hugsan sína um at fáa kirkju aftur til bygdar. Tá hevði Selatrað verið uttan kirkju í 300 ár. Hann segði, at hann hevði tosað við sóknarprestin, sum tá var K. Vilhelm Nielsen, og hann var sera áhugaður í hesi søk.

Alt fólkið tók væl ímóti hesum ætlanum og lovaðu at stuðla so væl tey kundu. Ein innsavningarlisti var tað fyrsta sum gjørt varð, og Andrias Weihe setti seg sjálvan ovast á listan við 1.500 kr., og so fór innsavningin í gongd, fyrst á Morskranesi og Selatrað sjálvandi, og so víðari runt alt landið.

Undirtøkan var sera góð, tí tað sæst á innsavningarlistanum, at vanligir fiskimenn hava givið upp í hálva ársinntøku, so tað má sigast at vera undrunarvert. Føroya Løgting gav 3.000 kr. til arbeiðið. Og so fór hvør maður til verka.

Steingrímur Winther gjørdi tekningina, stuðlaður av einum felag fyri betri byggisiði. Emil Olsen og John Johannesen í Leirvík stóðu fyri stoypingini, meðan verkstaðið hjá Sámal Ellefsen og Heina Joensen í Miðvági stóð fyri timbur- og máláraarbeiðinum; teir vóru fleiri mans og teir búðu ymsa staðni í bygdini.

Teir byrjaðu at tosa um at byggja nýggja kirkju á Selatrað 3. jóladag 1925, og longu fyri jól árið eftir stóð kirkjan har klár at taka í brúk. Men av tí at kirkjan var nýmálað, so vóru teir samdir at bíða við vígsluni til eftir nýggjár, og so varð dagurin settur til at verða 4. sunnudag eftir trettanda.

Jákup Dahl próstur vígdi kirkjuna.

(KELDA: J. P. Gregoriussen, Nýggjaru Kirkjurnar])

» Tey halda í øllum førum, at tað ljóðar spennandi og skeg at eg, sum ein ung genta, siti í einum kirkjuráði

» Sjálv haldi eg ikki, at ein skal broyta hámessuna. Eg haldi tað er deiligt, at hámessan er so sum hon er

## Nýggjan prest

Ein av uppgávunum í kirkjuráðnum er at gera sítt til, at lív og vøkstur er kring kirkjuna.

Hinvegin koma kirkjuráðini eisini í ta støðu at skula seta nýggjan prest - t.v.s. at limirnir í kirkjuráðnum skulu viðgera umsóknir frá prestum, ið ynskja at gera tænastu í teirra sókn og kirkju.

Hesa royndina hevur Durita eisini gjørt, tá Sjóvar prestagjald fyrr í ár samtykti at seta Símun P. Jacobsen í starv sum prest, m.a. í Selatraðar kirkju.

– Ja, tað var spennandi at fylgja við í tí arbeiðinum, – hetta at síggja, hvussu nógvir prestar søktu starvið, og ikki minst at vita, hvørji teir vóru sum høvdu søkt starvið, sigur hon.



*Símun P. Jacobsen.*
*– Eg haldi, at vit hava fingið ein góðan prest, sigur Durita Djurhuus*